Kappingareftirlitið

Niels Winther Poulsen, adv.
Frúutrøð 4
100 Tórshavn

**Tórshavn**, 8. februar 2019

**Mál. nr.:** 19/00047

**Viðv.: P/F SMS yvirtekur ræði á P/F Dvøljan**

Kappingareftirlitið fekk tann 24. januar 2019 fráboðan um, at P/F SMS hevði í umbúna at keypa 50% av partapeninginum í P/F Dvøljan frá P/F Gist & Vist. P/F Dvøljan rekur matstovurnar Burger King, Sunset og Baresso í SMS.

P/F SMS og P/F Gist & Vist eiga frammanundan ætlaðu yvirtøkuni hvør síni 50% í P/F Dvøljan.

Talan er um yvirtøku eftir § 13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini, og tá umsetningurin hjá pørtunum er omanfyri mørkini í § 14, stk. 1, nr. 1, skal Kappingareftirlitið taka støðu til yvirtøkuna.

Talan er um yvirtøku, sum kemur undir § 3, stk. 1 nr. 2 í reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012, og er tí fráboðað eftir einføldum leisti.

Kappingareftirlitið hevur kannað yvirtøkuna og metir ikki, at yvirtøkan gevur orsøk til ivasemi. Kappingareftirlitið hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna, sambært § 15, stk. 5 í kappingarlógini.

Góðkenningin er treytað av at tær upplýsingar, ið fráboðari hevur latið, eru rættar, sambært § 18a, stk. 3 í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Runi J. Niclassen
Fulltrúi